# Arbeiðsloysisskipanin

## Ársfrásøgn fyri 2012

**Avrit**

---

Ársfrásøgnin er góðkend á stýrisfundi, tann   /    2013

Fundarstjóri:

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um skipanina v.m. | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 5 - 6 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 7 - 8 |
| Frágreiðing frá leiðslu | 9 - 22 |
| Rakstrarroknskapur | 23 |
| Fíggjarstøða | 24 - 25 |
| Pengastreymsuppgerð | 26 |
| Nýttur roknskaparháttur | 27 - 30 |
| Notur til ársfrásøgnina | 31 - 33 |

## Felagið

Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14
FO-100 Tórshavn
Telefon: 359550
Telefax: 359551
Heimasíða: www.als.fo
Roknskaparár: 01.01 - 31.12

## Stýrið

Eyðfinnur Jacobsen, Stýrisformaður
Eyðstein Djurhuus
Ingeborg Vinther
Marita Rasmussen
Snorri Fjallsbak
Vár í Gong
Viberg Sørensen

## Tiltakslimir

Vígdis Johannesen
Ester Dahl

## Stjórn

Magni á Deild Olsen, Stjóri

## Grannskoðan

JANUAR
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri Arbeiðsloysisskipanina fyri roknskaparárið 01.01.12 - 31.12.12.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini við teimum tillaginum, sum stýrið hevur mett verið neyðugar, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá skipanini. Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin á ein rættvísandi hátt lýsir tey viðurskifti, sum frágreiðingin fevnir um.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfund, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 5. apríl 2013

**Stjórn**

Magni á Deild Olsen
Stjóri

**Stýrið**

Eyðfinnur Jacobsen
Stýrisformaður

| | | |
|---|---|---|
| Marita Rasmussen | Snorri Fjallsbak | Vár í Gong |
| Viberg Sørensen | Eyðstein Djurhuus | Ingeborg Vinther |

**Til leiðsluna í Arbeiðsloysisskipanini**

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 01.01.12 - 31.12.12, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymi og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og lógini um ALS.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlógini. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31.12.12 og av úrslitinum av virksemi, peningastreymi hjá Arbeiðsloysisskipanini í roknskaparárinum 01.01.12 - 31.12.12 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina.Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 5. apríl 2013

**JANUAR**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| Jørmann Petersen | Jóhan Martin Jacobsen |
| Statsaut. revisor | Skrásettur grannskoðari |

## HØVUÐSTØL

| Upphædd í tkr. | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | | | | | |
| Inntøkur | 180.543 | 141.946 | 140.450 | 137.290 | 141.161 |
| Indeks | 128 | 101 | 99 | 97 | 100 |
| Útgjøld og útreiðslur, arbeiðsleys | -244.284 | -308.430 | -259.544 | -157.271 | -46.847 |
| Indeks | 521 | 658 | 554 | 336 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | -84.495 | -184.833 | -138.447 | -33.078 | 81.768 |
| Indeks | -103 | -226 | -169 | -40 | 100 |
| Fíggjarligir postar, netto | 15.038 | 2.275 | 32.226 | 53.988 | -24.107 |
| Indeks | -62 | -9 | -134 | -224 | 100 |
| Ársúrslit | -77.096 | -189.320 | -112.157 | 17.770 | 56.230 |
| Indeks | -137 | -337 | -199 | 32 | 100 |

### Fíggjarstøða

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Aktiv tilsamans | 345.484 | 435.133 | 614.963 | 727.223 | 700.515 |
| Indeks | 49 | 62 | 88 | 104 | 100 |
| Íløgur í materiella støðisogn | 2.532 | 5.515 | 9.516 | 2.615 | 23.433 |
| Indeks | 11 | 24 | 41 | 11 | 100 |
| Eginogn | 335.402 | 412.498 | 601.817 | 713.974 | 696.204 |
| Indeks | 48 | 59 | 86 | 103 | 100 |

### Pengastreymar

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettopengastreymar frá: | | | | | |
| Rakstri | -87.252 | -175.126 | -115.431 | 26.978 | 57.001 |
| Íløgum | -2.532 | -5.525 | -9.516 | -1.170 | -23.369 |
| Pengastreymar í árinum | -89.784 | -180.651 | -124.946 | 25.808 | 93.340 |

## LYKLATØL

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | | | | |
| Renting av eginogn | - | - | - | 3,2% | 8,4% |
| **Soliditetur** | | | | | |
| Eginognarpartur | 97,1% | 94,8% | 97,9% | 98,2% | 99,4% |
| **Annað** | | | | | |
| Ársverk í miðal | 29 | 25 | 21 | 17 | 16 |

Renting av eginogn $\dfrac{\text{Úrslit av vanligum rakstri x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$

Eginognarpartur $\dfrac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

## LYKLATØL

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá "Den Danske Finansanalytikerforenening".
Lyklatøl við negativum virði eru ikki tikin við.

## Ársfrágreiðing

Eftir at arbeiðsloysið var methøgt í byrjanini í 2011, minkaði tað støðugt fram til oktober mánað í 2011, tá tað aftur fór at vaksa nakað inn í januar í 2012. Tá 2012 byrjaði fingu stívliga 1.700 arbeiðsloysisstuðul frá ALS.

Í 2012 helt arbeiðsloysið á at minka fram til september mánað, tá 1.128 fólk fingu arbeiðsloysisstuðul. Síðani tá er talið av fólki, sum hevur fingið arbeiðsloysisstuðul hækkað nakað aftur, so tað við árslok í 2012 var beint niðanfyri 1.200 fólk.

Saman við teimum, sum fáa forsorgarhjálp frá Almannaverkinum vegna arbeiðsloysi, svarar tað til, at arbeiðsloysið í desember var 4,5%.

Einki land í ES hevði eitt so lágt arbeiðsloysi við árslok í 2012, og tað landið í ES, sum hevði lægst arbeiðsloysi var Eysturríki, har arbeiðsloysið var 4,7% í desember 2012. Í grannalondunum var tað bert í Noreg, at arbeiðsloysið var lægri enn í Føroyum. Í Noreg var arbeiðsloysið beint omanfyri 3% við ársskiftið.

Búskaparliga er ætlanin við arbeiðsloysisskipanini, at hon skal byggja upp eitt nøktandi búskaparligt fríholt í góðum tíðum, tá arbeiðsloysið er lágt, og tá tíðirnar gerast verri og arbeiðsloysið veksur, skal uppspardi vinningurin brúkast at rinda arbeiðsleysum stuðul.

Á heystið í 2009 hevði Arbeiðsloysisskipanin eina eginogn, sum táttaði í 750 mió. krónur. Seinastu trý árini hevur samlaða útgjaldið úr ALS verið 812 mió. krónur, og samlaða hallið hesi somu árini hevur táttað í 380 mió. krónur. Í 2012 var hallið 77,1 mió. krónur.

Harvið hevur skipanin virkað sum ætlað og bygt upp í góðum tíðum og rindað út í verri tíðum.

Hetta, at Arbeiðsloysisskipanin framvegis hevur hall, hóast arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt, ber kortini boð um, at tørvur verður á at gera broytingar í skipanini, so javnvág aftur fæst í rakssturin hjá skipanini, áðrenn eginognin er burturi.

Búskaparliga ber Arbeiðsloysisskipanin útgjøld til áleið 700-800 fólk, sum svarar til eitt arbeiðsloysi á áleið 3%, og í løtuni er talið av fólkum, sum fáa útgjald úr skipanini, næstan tvífalt tað, so minkar arbeiðsloysið ikki munandi, mugu partarnir á arbeiðsmarknaðinum gera av, hvat best er at gera fyri at tryggja ALS búskaparliga.

**Arbeiðsloysið í ES-londum**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 4,5% | Finland | 7,7% | Litava | 13,2% |
| Eysturríki | 4,5% | Stóra Bretland | 7,7% | Kypern | 14,1% |
| Lukseburg | 5,1% | Svøríki | 8,4% | Letland | 14,4% |
| Týskland | 5,4% | Estland | 9,9% | Slovakia | 14,5% |
| Niðurlond | 5,6% | Slovenia | 9,9% | Írland | 14,7% |
| Rumenia | 6,7% | Frankaríki | 10,4% | Portugal | 17,0% |
| Malta | 6,9% | Pólland | 10,4% | Spania | 26,2% |
| Belgia | 7,4% | Ungarn | 10,9% | Grikkaland | 26,6% |
| Danmark | 7,4% | Italia | 11,2% | | |
| Tjekkia | 7,5% | Bulgaria | 12,4% | | |

**Inngjøldini hækkað**

Ásannandi búskaparligu avleiðingarnar av høga arbeiðsloysinum, sum hevði verið í 2011, tók stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina tá stig til broytingar í bæði inngjøldunum og útgjøldunum, sum seinni vórðu samtyktar á løgtingi.

Inngjaldið, sum hevði verið óbroytt 1% síðani 1. juli 2004, var við virknaði frá 1. januar 2012 hækkað við einum fjórðingsprosentstigi upp í 1,25% galdandi fyri bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar.

Virknaðurin var, at inntøkurnar, sum høvdu verið rættiliga støðugar á uml. 140 mió. krónum seinastu fimm árini, hækkaðu upp í 180,5 mió. krónur í 2012. Til samanberingar vóru inntøkurnar 141,9 mió. krónur í 2011.

Lønarútgjaldingarnar í 2012 vóru slakar 230 mió. krónur hægri enn í 2011, men broytingin í inngjaldsprosentinum var orsøk til nógv tann størsta partin av broytingini í samlaðu inngjøldunum.

**Útgjaldið eisini broytt**

Longu tá stýrið tíðliga í 2011 byrjaði at fyrireika broytingar at fáa betri javnvág í raksturin hjá ALS, var greitt, at tað var ikki nøktandi bara at gera broytingar í inngjøldunum. Neyðugt var eisini at gera broytingar í útgjaldsviðurskiftunum.

Á sumri í 2009, tá fíggjarstøðan hjá ALS var góð, vóru broytingar gjørdar, sum betraðu um viðurskiftini hjá teimum, sum ikki høvdu arbeiði. Útgjaldið var hækkað úr 70% av útgjaldsgrundarlagnum upp í 80% fyrsta árið og síðani 75% restina av útgjaldsdøgunum, og markið fyri hægsta útgjald varð hækkað úr stívliga 13 tús. krónum upp í 20 tús. krónur um mánaðin.

Tá arbeiðsloysið av álvara fór at vaksa við árslok í 2010, var skjótt greitt, at neyðugt var at broyta hesi viðurskifti aftur.

Úrslitið varð, at galdandi frá síðst í mai mánaði í 2012 varð útgjaldið lækkað úr 80% av útgjaldsgrundarlagnum niður í 75%. Markið fyri mesta útgjald varð lækkað úr 20 tús. krónur um mánaðin niður í 17.500 krónur, og um sama mundið var skipanin við bíðidøgum, sum var tikin burtur við lógarbroytingunum í 2009, tikin í nýtslu aftur. Tá persónur nú missir arbeiði, fær viðkomandi ikki arbeiðsloysisstuðul fyrstu 10 dagarnar, eftir at viðkomandi er farin úr starvi.

## Lønir og kostnaðir

Við árslok í 2012 vóru 29 fólk í føstum starvi hjá ALS. Til samanberingar vóru 25 fólk í starvi eitt ár frammanundan.

Umframt tey 29 starvsfólkini, sum eru í føstum starvi, hava 7 fólk verið í starvsvenjing í styttri og longri tíð hjá ALS í 2012.

Samlaðu starvsfólkaútreiðslurnar vóru 12,9 mió. krónur, sum er 2,8 mió. krónur meiri enn í 2011.

## Ársúrslit og eginogn

Tekniska úrslitið, sum er munurin millum inntøkur og útreiðslur til arbeiðsleys, var eitt hall á 63,7 mió. krónur. Tað er 102,6 mió. krónur betri enn í 2011, tá tekniska úrslitið var eitt hall á 166,3 mió. krónur.

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt hall á 84,5 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt hall á 184,8 mió. krónur í 2011.

Avskrivingarnar í 2012 vóru væl hægri enn í 2011. Orsøkin er hon, at ALS gjørdi lutfalsliga stórar íløgur serliga í kt-útgerð í 2011, og hon verður avskrivað eftir fáum árum. Í 2011 vóru avskrivingarnar 4,9 mió. krónur í mun til 3,6 mió. krónur í 2011.

Hóast samlaðu íløgurnar í virðisbrøv vóru væl lægri í 2012 samanborið við í 2011, so vóru inntøkurnar av íløgunum munandi hægri. Í 2012 vóru fíggjarinntøkurnar 15,0 mió. krónur, meðan tær í 2011 vóru 2,3 mió. krónur.

Ársúrslitið gjørdist eitt hall á 77,1 mió. krónur. Samanborið við árið frammanundan var talan um eina munandi betring. Í 2011 var úrslitið eitt hall á 189,3 mió. krónur, og talan var sostatt um eina betring á 112,2 mió. krónur.

Samlaðu íløgurnar í virðisbrøv skifta serliga í mun til úrslitið hjá ALS. Hevur skipanin hall, verða virðisbrøv seld at fíggja hallið, og hevur skipanin avlop, verða íløgur gjørdar í virðisbrøv fyri at betra um trygdina av tøka peninginum og fyri at tryggja skipanini betri inntøkur frá fíggjarognunum.

Við árslok í 2011 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 378,7 mió. krónur. Hallið í 2012 hevði við sær, at virðisbrævaognirnar minkaðu við 83 mió. krónum niður í 295,7 mió. krónur.

Við ársbyrjan í 2012 var eginognin 412,5 mió. krónur, og við árslok eitt ár seinni var eginognin minkað niður á 335,2 mió. krónur.

Sum skipanin er í løtuni, so heldur eginognin til áleið fýra ár við sama halli, sum var í 2012.

**Skipanin**

Høvuðsendamálini við Arbeiðsloyisskipanini eru staðfest í grein 1 í lógini um ALS. Tey eru:

- at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys
- at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði
- at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin

Fyrsti parturin – tann at veita arbeiðsleysum fíggjarligan stuðul – er tað, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur lagt – og framvegis leggur – stóran dent á, og tann parturin virkar væl.

Í 2012 vóru gjørdar ymsar broytingar innan eitt nú mannagongdir, sum hava havt við sær, at avgreiðslutíðirnar av umsóknum um arbeiðsloysisstuðul eru styttar, og at málsviðgerin er ajour.

Tað verður áhaldandi arbeitt við at gera hendan partin av tænastuni enn betri og at tryggja dygd og skjótleika í allari málsviðger, og hóskandi kt-skipanir er ein avgerandi fyritreyt fyri at eydnast við hesum.

Skipanin, ið verður brúkt til at fyrisita útgjald av arbeiðsloysisstuðuli varð ment av Elektron lutfalsliga stutt eftir, at ALS var farið at virka. Tað merkir, at skipanin er eini 17-18 ára gomul, og stórvegis betringar hava ikki verið gjørdar av skipanini hesi árini. Í sambandi við at TAKS fer at flyta sínar kt-skipanir av sokallaða main-frame'inum hjá Elektron, er avgerð tikin um, at ALS eisini skal hava eina nýggja útgjaldsskipan. Ein nýggj útgjaldsskipanin verður í stóran mun ment innanhýsis, og tá hon verður liðug um stívliga eitt ár, fer tað at hava við sær, at ALS verður meiri sjálvbjargið í kt-høpi, og fer at kunna loysa frá Elektron. Tað fer so eisini at hava munandi sparingar við sær, umframt at tænastan verður betri og smidligari.

## Smidlig arbeiðsávísing

Virksemið hjá ALS fevnir um annað og meiri enn at rinda arbeiðsloyissstuðul út. Týðandi partur av endamálunum er at virka fyri, at tað verður lættari hjá arbeiðsleysum aftur at fáa arbeiði umframt at ALS skal umsita eina arbeiðsávísing.

Hvat arbeiðsávísingini viðvíkur, so hevur tað verið partur av virkseminum hjá ALS í nógv ár at tryggja føroyskum arbeiðsgevarum starvsfólk við røttu førleikunum, men ásannast má, at skipanin ikki hevur virkað til fulnar, og tað hevur verið ov trupult at finna røttu fólkini, tá arbeiðsgevarar hava sóknast eftir fólki.

Avleiðingarnar av hesum eru nú tiknar til eftirtektar, og síðani november í 2012 er enn størri dentur lagdur á at menna arbeiðsávísingina, so hon í størri mun stendur mát við tørvin hjá arbeiðsgevarunum. Tvey fólk arbeiða nú burturav við arbeiðsávísing, og ALS hevur nú eina vikarskipan, har fólk í skipanini við stuttum skotbráði verða boðin arbeiði, tá arbeiðsgevarar bráðfeingis hava tørv á fólki.

Hóast stutt er liðið, síðani vikarskipanin av álvara fór at virka, so eru royndirnar higartil góðar, og fleiri fólk hava verið úti hjá arbeiðsgevarum og roynt seg, og eisini arbeiðsgevararnir hava latið væl at. Í onkrum førum hava ALS-vikarar fingið fast starv hjá arbeiðsgevarum, sum teir hava verið vikarar hjá, meðan onnur hava tikið avgerð um at fara at útbúgva seg innan øki, har tey hava verið vikarar.

Ætlanin er framhaldandi at menna arbeiðsávísingina og gera hana enn smidligari. Tað verður gjørt við áhaldandi at vitja arbeiðsgevarar og gera vart við skipanina og at kunna arbeiðsleys um møguleikarnar.

## Førleikamenning og aktivering

Tað varð nevnt, at hóast arbeiðsloysið í Føroyum er lágt, so hevur Arbeiðsloysis¬skipanin framvegis lutfalsliga stórt hall, og tað verður sannlíkt tørvur á at gera broytingar, so at raksturin hjá skipanini innan alt ov langa tíð fer at javnviga.

Upplagdu broytingarnar eru at hækka inngjaldið og møguliga eisini at gera broytingar í útgjaldsviðurskiftunum, og hóast tað neyvan slepst undan at meta um hesi viðurskifti, so eigur ALS eisini at meta um aðrar møguleikar fyri at fáa betri búskaparliga javnvág – og møguleikarnir eru nógvir.

Upplagdur møguleiki er at virka fyri, at fólk, sum einki arbeiði hava, koma sær út aftur á arbeiðsmarknaðin sum skjótast. Hóast arbeiðsloysið ikki er høgt, so er tað ikki í øllum førum lætt, tí førleikarnir, arbeiðgevarar hava tørv á, skifta, og tekin eru um, at fólkini, tørvur er og verður á, er fólk við antin útbúgving ella við serligum royndum.

Tí er tað ein avbjóðing hjá ALS at tryggja føroyskum arbeiðsgevarum arbeiðs-megi við røttum og nøktandi førleikum. Til tað krevst ein væl fyriskipað førleika¬menning, sum áhaldandi hevur støði í eginleikunum og førleikunum hjá hvørjum einstøkum menniskja og í ítøkiliga tørvinum hjá arbeiðsgevarunum.

Til tess at tryggja vitan um tørvin á førleikum fer ALS framhaldandi at arbeiða tætt saman við føroyskum arbeiðsgevarum at vita, hvør tørvurin og framtíðar-tørvurin er á arbeiðsmegi, og á tann hátt tryggja eina nøktandi førleikamenning.

**Heldur arbeiða uttanlands enn arbeiðsleysur í Føroyum**

Tá tørvur ikki er á arbeiðsmegini í Føroyum, er neyðugt at skoða út um landoddarnar at vita, um tað ber til at hjálpa føroyingum í starv hjá útlendskum arbeiðsgevarum. Hetta hevur ALS roynt áður, tá svartasta niða var á føroyska arbeiðsmarknaðinum afturi í 1995, og royndirnar tá at fáa føroyingum arbeiði í oljuvinnunum í Bretlandi og Noreg vóru eftir øllum at døma góðar.

Hetta er ein táttur, sum ALS eigur at taka uppaftur, nú útlitini at fáa arbeiði í Føroyum eru ivasom.

**Broytingar í skeiðsvirksemi**

Galdandi reglur áseta, at ALS undir ávísum treytum kann undantaka fólki at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum í upp til 3 mánaðir í samband við útbúgvingarskeið ella líknandi og samstundis fáa arbeiðsloysisstuðul.

ALS hevur fyriskipað átøk og skeið viðvíkjandi førleikamenning – eisini í samstarvi við onnur umframt at keypt slík frá uttanhýsis veitarum. Eisini hava einstaklingar havt møguleika at søkja um skeið um førleikamenning, sum ALS hevur viðgjørt út frá eini ítøkiligari meting, um skeiðið betraði um arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikarnar hjá tí einstaka.

Frá 1. apríl 2012 voru hesar fyritreytir broyttar, tí ALS fer at stýra førleikamenningini meiri málrættað innan verandi karmar við støði í eginleikum og førleikum hjá tí einstaka og í eftirspurninginum á arbeiðsmarknaðinum

**Lærugreinar á 10-flokksstigi**

Tað er ein sannroynd, at útbúgvingarmøguleikarnir hjá vaksnum fólki í Føroyum eru avmarkaðir, og forðingar eru hjá teimum, sum eru farin úr skúlanum úr 7., 8. ella 9. flokki, tí møguleikar eru ikki at uppstiga tann partin fyri at betra um møguleikarnir at útbúgva seg víðari.

Hetta er ein avbjóðing, sum ALS møtir í heilum. Tí hevur ALS í tøttum samstarvi við kvøldskúlarnar í Tórshavn og Runavík skipað fyri frálæru í lærugreinum á 10. flokksstigi seinastu árini. Fleiri

tíggjutals fólk hava tikið av hesum møguleikum, og hetta hevur givið teimum luttakandi møguleika at betra um síni fólkaskúla¬prógv. At tað loysir seg gongur sjón fyri søgn, tí fleiri av teimum, sum hava staðið royndirnar, eru farin víðari á miðnám ella aðrar útbúgvingar.

Tað er vónin, at hesi átøk eru við til at seta ferð á eina skipaða vaksnamanna-undirvísing, sum áhaldandi kann tryggja lívslanga læru og eftirútbúgving.

**Handverksskeið í samstarvi við Tekniska Skúla og Skótarnar**

Umframt samstørvini við kvøldskúlarnar hevur ALS eisini gott samstarv við Tekniska Skúla í Havn, har arbeiðsleys í tveimum umførum hava verið á skeið í tríggjar mánaðir í handverki og timburarbeiði.

Fyrra skeiðið byrjaði í desember í 2011. Tá tóku 14 arbeiðsleys lut á skeiðnum, og umframt at fleiri teirra hava fingið arbeiði, eru eisini fleiri, sum meldaðu seg til SIT-útbúgvingina á Tekniska Skúla.

Seinna skeiðið byrjaði í januar í 2013, og tað verður liðugt í apríl mánaða, men longu nú eru tað eisini fleiri á hesum skeiðnum, sum hava teknað seg til SIT-útbúgvingina.

Saman við bókliga partinum av hesum skeiðnum er eisini ein verkligur partur. Á fyrra skeiðnum smíðaðu tey yvirtromina á bygdasavninum í Kvívík, og á hesum seinna skeiðnum hava luttakararnir verið á Skótadeplinum á Selatrað og gjørt goymslurúm inni á niðurløgdu smoltstøðini, sum skótarnir hava har. Tey hava eisini smíðað ymsar kassar, sum verða brúktir og seldir í Vakstrarhúsinum í Sandavági.

Harvið tvinna hesi førleikamennandi skeið ein bókligan, yrkisligan part saman við ein verkligan part, sum er samfelagsgagnligar verkætlanir, sum ikki eru í kapping við verandi vinnulív.

Tí er hetta ein vinnarastøða fyri allar partar, og ætlanin er, at ALS í framtíðini eisini fer at leggja enn størri dent á slíka – heldur drúgvari – førleikamenning.

**Vakstrarhúsið**

Eitt annað nýtt og heldur øðrvísi konsept hjá ALS var at leiga vakstrarhúsið í Sandavági.

Verkætlanin umboðar eina hugsjón hjá ALS um ein alternativan arbeiðsmarkað í tíðum við høgum arbeiðsloysi. Alternativi arbeiðsmarknaðurin skal tryggja fólki møguleikan at sleppa at nýta sínar førleikar og mennast og samstundis vera við til at skapa samfelagsgagnlig virðir. Økið fyri slíkum verkætlanum er alt, sum hvørki í ringum ella góðum tíðum verður gjørt ella raðfest, men um tað verður gjørt vil ríka samfelagið og tey, sum sleppa at virka innan hesa hugsjón.

Treytirnar eru at talan ikki er um kappingaravlagandi virksemi, og at virksemið er samfelagsgagnligt umframt, at tey ið luttaka, gera tað fyri sín arbeiðsloysis-stuðul í einum mennandi umhvørvi.

Høvuðsendamálið við Vakstrarhúsinum er at skapa gróðrarbotn fyri eini hugburðsbroyting, har Arbeiðsloysisskipanin umframt at gjalda arbeiðsloysis-stuðul, eisini skapar møguleika hjá fólki at sleppa aftur til arbeiðis, og á tann hátt styrkja um sínar førleikar og fáa lut á gleðini við at vera á arbeiðs-marknaðinum

Arbeiðið er ein sera týðandi partur av okkara samleika, og kanningar vísa, at  tað at vera arbeiðsleysur kann hava álvarsom neilig árin á fólk. Arbeiðsloysið ávirkar fólk bæði sálarliga, kropsliga, sosialt og búskaparliga. Tí hevur tað so stóran týdning, at hjálpa fólki aftur á arbeiðsmarknaðin ella um tað ikki ber til, so at skapa karmar, har fólk kenna seg sum partur av einum arbeiðsplássi. Tað nýtist ikki at vera eitt arbeiðspláss, sum virkar á vanligum handilsligum grundarlagi, men kann vera eitt umhvørvi har fólk sleppa at vera saman og at avrika.

Royndir vísa eisini, at tað er lættari at fara í eitt nýtt arbeiði, tá man frammanundan er í arbeiði í mun til um ein er arbeiðsleysur. Eisini tí hevur tað so stóran týdning at  vera partur av einum arbeiðsumhvørvi, og tí eigur ALS at ganga á odda – um neyðugt saman við øðrum – og skipa verkætlanir sum hana í Sandavági.

Úti við 30 fólk hava verið til verka í Vakstrarhúsinum í Sandavági, og av teimum eru fleiri, sum hava fingið arbeiði aðrastaðni ella eru farin at útbúgva seg.

Afturmeldingar frá teimum, sum hava verið har vesturi hava verið sera jaligar, og umframt at halda fram at brúka Vakstrarhúsið sum higartil, so er ætlanin nú at víðka verkætlanina soleiðis, at vakstrarhúsið í Sandavági verður miðdepil í einum víðkaðum samstarvi við Búnaðarstovuna í Kollafirði, sum millum annað umfatar at velta eplir og røtur, at gera eitt framsýningarøki við grønmeti og øðrum og at skapa karmar fyri føroysk húsdjór á økinum hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði.

Í summar fer samstarvið við Búnaðarstovuna eisini at fevna um innsavnan av føroyskari ull, sum verður seld av landinum.

Ætlandi verður verkætlanin við Vakstrarhúsinum í Sandavági bara tann fyrsta av sínum slagi. So hvørt sum til ber er ætlanin at skipa fleiri og onnur slík umhvørvi, har fólk kunnu sleppa til verka.

**Verkætlan við ungum**

Tað hevur stóran týdning, at tey ungu sleppa at royna seg – antin í arbeiði ella útbúgving – og tí verður stórur dentur lagdur á at stuðla teimum ungu, sum koma í Arbeiðsloysisskipanina, víðari so skjótt sum yvirhøvur til ber.

Tí tóku starvsfólk hjá ALS í september mánaði stig til at tosa við øll tey yngri enn 26 ár alt fyri eitt, tey koma í skipanina hjá ALS.

Endamálið er at fáa tey ungu skjótari aftur í arbeiði ella útbúgving, og amboðini eru at koyra eitt sindur undir tey og at motivera tey til sjálvi at finna sær eitt starv ella eina útbúgving.

Eisini við hesi verkætlanini eru royndirnar góðar, og tríggjar mánaðir eftir at verkætlanin fór av bakkastokki var omanfyri helmingin av teimum ungu farin víðari.

Ætlanin er at halda fram við hesi verkætlanini við teimum ungu, og umhugsað verður eisini, um hesin sami leisturin við hepni kann nýtast til onnur eisini.

**35 nýggj størv umborð á Norrønu**

Søguliga hava útlendingar mannað fleiri av størvunum umborð á Norrønu, men havandi í huga stóra arbeiðsloysið í 2011 metti ALS, at her var eitt upplagt øki fyri føroyska arbeiðsmegi.

Tí vendi ALS sær til Smyril Line í 2011, og eitt samstarv byrjaði, sum á vári 2012 gav omanfyri 100 fólkum úr skipanini hjá ALS, møguleika fyri at fara til starvsamrøðu hjá Smyril Line. Av teimum fingu 35 fólk starv umborð á Norrønu.

Henda verkætlanin virkaði so mikið væl, at avgjørt var at royna sama leist, nú summarsiglingin hjá Norrønu stundar til.

**Næstan 400 fólk í starvsvenjing**

Tann 1. januar 2011 kom kunngerð um starvsvenjing fyri arbeiðsleys í gildi. Í lógarbroytingini á vári 2009 vórðu heimildirnar í sambandi við førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys víðkaðar m.a. soleiðis, at skipanir viðvíkjandi arbeiðsvenjingum, har Arbeiðsloysisskipanin endurrindar arbeiðsgevaranum, kundu setast í verk.

Fram til 1. apríl 2013 hava 378 persónar verið í starvsvenjing hjá 248 ymsum arbeiðsgevarum, og talan hevur verið um samanlagt 452 starvsvenjingar.

Skipanin við starvsvenjing verður endurskoðað í 2013.

**Førleikametingar**

Í enn eini roynd at slóða fyri, so vegurin aftur á arbeiðsmarknaðin verður so lættur sum til ber, tók ALS nakað eftir summarfrítíðina í 2012 stig til at førleikameta tveir handverkarar, sum vóru í skipanini. Felags fyri teir báðar var, at teir høvdu arbeitt sum handverkarar og húsasmiðir í mong ár, men teir høvdu ikki staðið í læru, og høvdu tí ikki eitt sveinabræv at vísa á.

Í samstarvið við Yrkisnevndina og Tekniska Skúla í Havn varð skipað so fyri, at serkønur í førleikametingum innan timburyrkið kom til Føroyar at førleikameta hesar báðar menninar umframt at leggja lærarum á Tekniska Skúla lag á, hvussu slíkar førleikametingar fara fram.

Úrslitið varð, at teir báðir fóru á skúlabonk á Tekniska Skúla at nema sær ta vitanina, sum manglaði og eftir 12 vikur á skúlabonki gjørdu teir sveinastykki, og í januar í 2013 fingu teir báðir sveinabræv sum húsasmiðir.

Úrslitið sást aftur mest sum alt fyri eitt. Stutta tíð eftir, at teir kundu kallað seg útbúnir húsasmiðir, høvdu báðir fingið arbeiði.

**20-ára hald**

Virksemið hjá Arbeiðsloysisskipanini byrjaði um sama mundi, sum stóra kreppan tók seg upp í Føroyum í 1992. Tann 16. mars 1992 tók ALS ímóti fyrstu inngjøldunum, og 1. august sama árið rindaði skipanin arbeiðsloyisstuðul út á fyrsta sinni.

Sostatt vóru tað í 2012 tjúgu ár síðani skipanin fór at virka, og hetta varð gjørt vart við við eini ráðstevnu í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 31. august. Ráðstevnan var almenn, og væl av fólki møtti í Norðurlandahúsinum.

Um kvøldið var skipað fyri døgurða fyri stýrislimum og starvsfólkum við makum.

**ALS umboðað úti um landið**

Søguliga hevur høvuðssætið hjá ALS altíð verið í høvuðstaðnum, og Arbeiðsloysisskipanin hevur bara verið umboðað í Havn.

Í august í 2012 stóð tað ALS í boðið at brúka skúlan í Søldarfirði sum miðstøð fyri virksemið hjá ALS í Eysturoynni og Norðoyggjum. Hetta hálva árið hevur hópin av ymsum virksemi verið í skúlanum, og royndirnar eru so góðar, at útlit eru til, at avtalan við Runavíkar kommunu verður longd. Umframt at skipað hevur verið fyri innkallingum og skeiðum av ymsum sløgum, so hava starvsfólk hjá ALS sítt fasta arbeiðspláss í skúlanum nakrar dagar um vikuna.

Eisini í Klaksvík hevur ALS verið umboðað og harvið verið nærri viðskifta-fólkunum. Í 2011 gjørdi

ALS avtalu við Klaksvíkar kommunu um eina tíðaravmarkaða roynd, har ALS hevði eitt arbeiðspláss á kommunuskrivstovuni, so bæði arbeiðsgevarar og tey, ið leita sær arbeiði høvdu høvið at støkka inn á gólvið at tosa við starvsfólk hjá ALS. Ætlanir eru um framhaldandi samstarv, men hesar ætlanir eru tó ikki ítøkiligar enn.

Í sambandi við at Vágs kommuna hevur ætlanir at skipa ein fjarlestrardepil í gomlu kommunuskrivstovuni í Vági, hava tey boðið ALS at verða partur av tí umhvørvinum. Gongst sum ætlað, fer ALS tí eisini at verða umboðað í Suðuroynni. Í fyrstu syftu verður talan um eina royndarverkætlan at vita, hvør tørvurin er, og hvussu verkætlanin eyðnast.

## Lógarbroytingar

Við kunngerð nr. 165 frá 20. desember 2011 var kunngerðin um ALS-gjald broytt soleiðis, at ALS-gjaldið frá 1. januar 2012 at rokna hækkaði úr 1,0% upp í 1,25%.

Við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012 varð løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 - lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing – broytt.

Broytingarnar umfataðu, at útgjaldið varð sett niður úr 80% í 75% av útrokningargrundarlagnum. Mesta útgjaldið varð eisini sett niður úr 20 tús. krónur um mánaðin niður í 17.500 krónur um mánaðin. Harafturat vóru bíðidagar settir inn aftur í lógina, og nú verður arbeiðsloysisstuðul ikki goldin, fyrr enn 10 bíðidagar er farnir frá tí, ein missir arbeiði.

## Fasti Gerðarrættur

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2012 var samlaða endurrindanin 83.250 krónur.

## Trygdargrunnur Fiskivinnunnar

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 1,2 mió. krónur í 2012.

## Stýrið

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloyisstrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn. Núverandi stýrið, ið lutvíst er mannað við varalimum, tók við tann 1. oktober 2009.

Nýtt stýrið verður valt í 2013.

## Útlit fyri 2013

Í síni búskaparmeting fyri 2013/2014 metir Landsbankin, at vøkstur fer at vera í føroyska búskapinum næstu tvey árini. Eisini Fíggjarmálaráðið roknar við vøkstri komandi árini, og saman við hækkandi almennum íløgum næstu árini kundi tað bent á vaksandi virksemi og harvið fleiri arbeiðspláss.

Millum stóru íløgurnar er Skúladepilin við Marknagil, tunnilin til Viðareiðis og umbygging og nútíðargerð av Landssjúkrahúsinum, og saman við øðrum verkætlanum eru tekin um, at byggivinnan fer at hava meiri at gera. Avbjóðingin við tí í mun til arbeiðsloysi er, at tað longu nú stendur á hjá byggivinnuni at fáa skikkað starvsfólk, og um virksemið økist, so er hugsandi, at tørvur verður á at fáa fremmanda arbeiðsmegi til Føroyar.

Vandi er fyri, at tey, sum nú einki arbeiði hava, ikki hava teir førleikarnar, sum byggivinnuni tørvar, og ein loysn kundi tí verið at ALS í samstarvi við byggivinnuna fer undir eina miðvísa førleikamenning, so tað í størri mun verða føroyingar, sum koma at gera almennu íløgurnar komandi árini.

Høvuðsvinnan, fiskivinnan, ekur á knøunum og hevur gjørt tað leingi. Feskfiskaveiðan undir Føroyum hevur verið í støðugari minking stórt sæð síðani aldarskifti, og veidda nøgdin nærkast nú tí hon var kreppuárini 1992 til 1994. Vánaliga veiðan hevur við sær, at tað búskaparliga stendur illa til hjá stórum pørtum av feskfiskaflotanum, og talið av skipum er minkað saman við talinum av fólki, sum starvast í fiskivinnuni.

Útlitini hjá fiskivinnuni komandi árini eru tí einki serlig. Minni er til av bæði toski og upsa, og hýsan er nærum horvin úr fiskiskapinum, og stovnarnir eru yvirhøvur illa fyri. Tí er lítið sannlíkt, at tað kann roknast við munandi vøkstri og fleiri arbeiðsplássum í høvuðsvinnuni.

Tó so – onkrir glottar eru. Tað gongur framvegis væl hjá flakatrolarunum, og við øktum makrel- og sildakvotum eru útlitini hjá uppisjóvarskipunum framvegis góð. Við nýggja virkinum á Tvøroyri vaks móttøkuorkan av uppisjóvarfiski munandi í 2012, men hóast útbyggingar aftur í 2013 er ikki vist, at stórvegis fleiri fólk fara til arbeiðis á hesum virkjum næstu tíðina. Tað er heldur ikki væntandi at stórvegis fleiri arbeiðspláss verða umborð á uppsjóvarskipunum og flakatrolarunum.

Hjá Alivinnuni gongur eisini væl. Nøgdirnar av aldum laksi eru vaksnar nógv seinastu árini, og sannlíkt verður væl tikið av laksi aftur í 2013, og roknað verður við, at prísirnir halda sær ella verða hægri enn í 2012.

Vónandi fer framgongdin hjá alivinnuni at hava við sær fleiri arbeiðspláss eisini.

Ymiskt er, hvussu støðan er hjá øðrum vinnum. Fíggjargeirin tykist hava fótað sær aftur eftir fíggjarkreppuna, sum tók seg upp í 2008, meðan handils- og tænastuvinnurnar yvirhøvur framvegis merkja lágan eftirspurning eftir teirra vørum og tænastum.

Hóast hægri lønarútgjaldingar og avleiðingarnar av sokallaða flatskattinum, so tykjast privatu húsarhaldini ikki at brúka ein so stóran part av tøku inntøkunum sum áður, og meiri verður spart upp ella rindað aftur av skuld. Avmarkaða nýtslan hjá privatu húsarhaldunum er ein orsøk til at meiri ferð ikki er komin á búskapin.

Hóast væntaðan vøkstur og størri almennar íløgur, so er ivasamt, hvussu útlitini fyri næstu árini eru. Vandi er fyri, at arbeiðsloysið ikki fer at minka stórvegis, og um so verður, so verður sannlíkt neyðugt at laga Arbeiðsloysisskipanina til eitt arbeiðsloysið, sum verður minst tað, tað er í dag og kanska hægri enn tað.

Neyvt hvørjar broytingar talan verður um, fer stýrið fyri ALS at røða um og taka støðu til í næstum.

Uttan mun til hvussu leikur ferst, so má ásannast, at tað framvegis fara at vera nógv fólk, sum einki arbeiði hava, og sum framhaldandi ikki fara at hava lætt við at koma sær aftur á arbeiðsmarknaðin. Tí er og verður arbeiðsloysið ein avbjóðing, sum rakar alt tað føroyska samfelagið, og neyðugt verður at loysa trupulleikn sum ein samfelagstrupulleika.

Tí mugu allir partar standa saman og lyfta í felag, fyri at tryggja øllum føroyingum eitt hóskandi arbeiði og føroyskum fyritøkum neyðuga arbeiðsmegi við røttum førleikum.

**Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá skipanini**

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2012 til 31. desember 2012 vísir eitt hall á 77.095.959 krónur móti einum halli á 189.319.787 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2011 til 31. desember 2011.

Leiðslan metir úrslitið vera nøktandi.

Tøkur peningur og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini eru í 2012 minkað við 89,9 mió. krónum úr 394,1 mió. krónum niður í 304,2 mió. krónur.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er tað hent, at formaðurin fyri stýrið eins og tríggir aðrir stýrislimir hava valt at siga seg úr stýrinum.

Landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur valt Eyðfinn Jacobsen, advokat til nýggjan stýrisformann. Fyri Jan Højgaard er Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- & Navigatørfelagnum komin í stýrið, og fyri Kartna Ravnsfjall er Vár í Gong komin í stýrið. Í sambandi við at Bjørgfríð Ludvig fór í starv sum aðalstjóri í Vinnumálaráðnum, kom Snorri Fjalsbak, stjóri á Lønardeildini í stýrið.

Eisini hevur Arbeiðsloyisskipanin fingið nýggjan stjóra. Ernst Jacobsen fór úr starvi sum stjóri í januar, og Magni á Deild Olsen tók við sum stjóri 1. mars 2013.

Av øðrum er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2012<br>DKK | 2011<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **Inngjøld** | **180.542.909** | **141.946** |
| | Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | -244.284.123 | -308.287 |
| | Aðrir kostnaðir | -7.818.730 | -8.390 |
| | **Bruttovinningur** | **-71.559.944** | **-174.731** |
| 1 | Starvsfólkaútreiðslur | -12.934.658 | -10.102 |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskriving** | **-84.494.602** | **-184.833** |
| | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -4.980.069 | -3.623 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-89.474.671** | **-188.456** |
| | Fíggjarpostar | 15.038.211 | 2.275 |
| | **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | **-74.436.460** | **-186.181** |
| | Skattur og avgjøld | -2.659.499 | -3.139 |
| | **Úrslit** | **-77.095.959** | **-189.320** |

**Býti av úrsliti**

Skotið verður upp at býta úrslitið soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| At flyta til næsta ár | -77.095.959 | -189.320 |
| **Tilsamans** | **-77.095.959** | **-189.320** |

# Fíggjarstøða

## AKTIV

| Nota | | 31.12.12 DKK | 31.12.11 t.DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | Grundøki og bygningar | 27.473.373 | 27.642 |
| 2 | Tøkniogn og maskinur | 3.709.095 | 5.658 |
| 2 | Rakstrargøgn og innbúgv | 924.201 | 1.255 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **32.106.669** | **34.555** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **32.106.669** | **34.555** |
| | Skuldarar | 8.977.623 | 6.430 |
| | Onnur áogn | 64.262 | 30 |
| | Tíðaravmarkingar | 7.200 | 7 |
| | **Áogn tilsamans** | **9.049.085** | **6.467** |
| | Virðisbrøv | 295.656.811 | 378.733 |
| | **Virðisbrøv og kapitalpartar tilsamans** | **295.656.811** | **378.733** |
| | **Tøkur peningur** | **8.671.029** | **15.378** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **313.376.925** | **400.578** |
| | **Aktiv tilsamans** | **345.483.594** | **435.133** |

## PASSIV

| Nota | | 31.12.12<br>DKK | 31.12.11<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 3 | Stovnsfæ | 93.840.006 | 93.840 |
| 3 | Flutt úrslit | 241.561.734 | 318.658 |
| | **Eginogn tilsamans** | **335.401.740** | **412.498** |
| | Vøru- og tænastuskuld | 1.924.181 | 3.324 |
| | Onnur skuld | 8.157.673 | 19.311 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **10.081.854** | **22.635** |
| | **Skuld tilsamans** | **10.081.854** | **22.635** |
| | **Passiv tilsamans** | **345.483.594** | **435.133** |

4 Veðsetingar og aðrar skyldur
5 Sáttmálabundnar skyldur
6 Nærskyldir partar

## Pengastreymsuppgerð

| | 2012<br>DKK | 2011<br>t.DKK |
|---|---:|---:|
| **Ársúrslit** | **-77.095.959** | **-189.320** |
| Avskrivingar | 4.980.067 | 3.624 |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| Áogn | -2.582.514 | 1.080 |
| Ognarar | -1.399.528 | 903 |
| Skyldugur arbeiðsloysisstuðul | -11.154.481 | 8.587 |
| **Pengastreymar frá rakstrinum** | **-87.252.415** | **-175.126** |
| Keyp av materiellari støðisogn | -2.532.166 | -5.525 |
| **Pengastreymar frá íløgum** | **-2.532.166** | **-5.525** |
| **Samlaðir pengastreymar í árinum** | **-89.784.581** | **-180.651** |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 394.112.421 | 574.763 |
| **Gjaldføri við árslok** | **304.327.840** | **394.112** |
| Gjaldføri við árslok verður útgreinaður soleiðis: | | |
| Tøkur peningur | 8.671.029 | 15.379 |
| Virðisbrøv | 295.656.811 | 378.733 |
| **Tilsamans** | **304.327.840** | **394.112** |

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvar við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í miðalstóra C-flokkinum, við teimum tillaginum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanlíkningartøl fyri undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og máting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt sum tær verða forvunnar, herundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma skipanini til góðar, og virði av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA OG TRYGDARDISPOSITIÓNIR

Ársfrásøgnin er gjørd í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar til tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur, ella -tap, verður tikið við í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Støðisogn, sum er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður umroknað til kursin tann dagin ognin er keypt.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Inntøkur

Gjøld frá løntakarum og arbeiðsgevarum v.m. verða inntøkuførd í tí roknskaparári, sum lønin, ALS-gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inntøkur frá sjálvstøðugt vinnurekandi verður inntøkuførd einaferð árliga og tryggingartakarin hevur yvirtikið skylduna fyri árslok.

### Útgjøld

Útgjøldini eru tíðargreinaðið soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men sum hoyra heima í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni ultimo í roknskaparárinum.

### Aðrir kostnaðir

Her er talan um kostnað í samband við útbreiðslu (distributión), marknaðarføring, umsiting, hølir og tap av ágóða.

### Avskrivingar

Avskriving av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at tað fer fram ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---:|---:|
| Bygningar | 50 ár | 32% |
| Framleiðslutól og maskinur | 3 ár | 0% |
| Annar útbúnaður, rakstrartól og innbúgv | 3-10 ár | 0% |

Grundøki verða ikki avskrivað.

Støðisogn við einum útveganarvirði, ið er minni enn kr. 20.000 pr. eind verður útreiðsluførd í roknskaparárinum.

### Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og –tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur og rentuendurgjald av skatti. Fíggjarinntøkur og fíggjarligir kostnaðir verða upptiknir við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

**Skattur og avgjøld**

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

Posturin umfatar meirvirðisgjald, ið stavar frá keypið av vørum og tænastum.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður upptikin í fíggjarstøðuni til kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirðið, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Vinningur - ella tap við avhending av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprísin frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið, tá støðisognin verður seld. Vinningur ella tap verður upptikin í rakstrinum undir avskrivingar.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, umfata goldnar útreiðslur sum viðvíkja næsta roknskaparár.

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, sum eru upptikin í ogn í umferð, umfata børsskrásett lánsbrøv og partabrøv, sum verða upptikin til dagsvirði seinasta roknskapardag. Virðisbrøv, sum ikki eru børsskrásett, verða upptikin til eitt søluvirði, sum er grundað á eitt roknað kapitalvirði.

**Skuld**

Stuttfreistað skuld verður tikin við til tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

## PENGASTREYMSUPPGERÐ

Pengastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísur pengastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í pengastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Pengastreymar frá rakstri er tillagað fyri ikki likvidar rakstrarpostar og broyting í rakstrarkapitali.

Pengastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av materiellari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevnda posti.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er samansettur av tøkum peningi og virðisbrøvum.

| | 2012<br>DKK | 2011<br>t.DKK |
|---|---|---|

## 1. Starvsfólkaútreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 11.208.671 | 8.688 |
| Eftirløn | 1.168.496 | 1.049 |
| Almenn gjøld | 432.756 | 311 |
| Aðrar starvsfólkaútreiðslur | 124.735 | 54 |
| Tilsamans | 12.934.658 | 10.102 |
| Harav samsýning til stjórn og stýrið | 1.189.858 | 1.087 |
| Miðaltal av starvsfólkum | 29 | 25 |

## 2. Materiell støðisogn

| Upphædd í DKK | Grundøki og bygningar | Tøkniogn og maskinur | Rakstrargøgn og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði pr. 31.12.11 | 28.541.047 | 15.557.711 | 2.744.243 |
| Tilgongd í árinum | 131.575 | 1.835.272 | 565.319 |
| Útveganarvirði pr. 31.12.12 | 28.672.622 | 17.392.983 | 3.309.562 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.11 | 899.249 | 9.900.060 | 1.489.120 |
| Av- og niðurskrivingar í árinum | 300.000 | 3.783.828 | 896.241 |
| Av- og niðurskrivingar pr. 31.12.12 | 1.199.249 | 13.683.888 | 2.385.361 |
| Roknskaparligt virði pr. 31.12.12 | 27.473.373 | 3.709.095 | 924.201 |

## 3. Eginogn

| Upphædd í DKK | Stovnsfæ | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.11 - 31.12.11* | | |
| Salda pr. 31.12.10 | 93.840.006 | 507.977.480 |
| Flutt úrslit | 0 | -189.319.787 |
| Salda pr. 31.12.11 | 93.840.006 | 318.657.693 |
| *Eginognaruppgerð 01.01.12 - 31.12.12* | | |
| Salda pr. 31.12.11 | 93.840.006 | 318.657.693 |
| Flutt úrslit | 0 | -77.095.959 |
| Salda pr. 31.12.12 | 93.840.006 | 241.561.734 |

Býti av stovnsfæ:

| | 2012<br>DKK |
|---|---|
| Føroya Landsstýri | 20.000.000 |
| Arbeiðsgevarar | 29.775.400 |
| Løntakarar | 30.139.356 |
| Frítíðargrunnurin | 13.925.250 |
| Salda pr. 31.12.12 | 93.840.006 |

## 4. Veðsetingar og aðrar skyldur

Ognirnar hjá skipanini eru ikki veðsettar.

Tað áhvílur ikki skipanini aðrar møguligar skyldir so sum ábyrgdir, vekslar v.m.

**5. Sáttmálabundnar skyldur**

Arbeiðsloysisskipanin hevur umsitingaravtalur við Fasta Gerðarrætt og Trygdargrunn Fiskivinnunnar.

**6. Nærskyldir partar**

| | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| Týðandi ávirkan: | |
| Vinnumálaráðið | Málsøki undir VMR |

Transaktiónir:

Skipanin hevur ikki handlað við, veitt lán til, veðsett ella stillað garanti til stýrið, stjórnina ella høvuðseigarar.